

*Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags fara at seta futt í Summar Festivalin í Klaksvík. Manningin í bólkinum er frá vinstru: Eliesar í Pálsstovu, Johannes Poulsen, Ólavur Klakk, Sonhard Johannesen og Rudolf Joensen. Hanus G. Johansen spælir eisini við, men hann var burturstaddur, tá myndin var tikin*

**Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags fara at spæla á Summar Festivalinum í Klaksvík. Høvuðsmaðurin í bólkinum lovar eitt lívligt og festligt show, nú bólkurin fer at spæla fyri fyrstu ferð í fimm ár**

FESTIVALUR

Gloym alt um nútíðar rock, rapprock, grunge, punk og hiphop.

Nú koma teir orginalu orginalarnir afturíaftur.

Teir eru bæði politiskir og ókorrektir.

Føroya svakast orkestur spælir á Summar Festivalinum í Klaksvík.

Ger so væl, Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags!

Tað eru liðin fimm ár, síðani teir seinast spældu. Tað var til ólavsøkukonsertina, tá ið teir fingu alt at kóka í Kommunuskúlagarðinum. Tey mongu fólkini stóðu púra býtt og gløddu, tá ið bólkurin kom á pallin, tí eingin visti rættiliga, hvat tey skulu væntað, men tá ið Ólavur Presley og hansara menn fyrstu høvdu sett gongd í, vóru hvørki teir ella áhoyrararnir til at steðga aftur.

### Eitt ordans show

Bólkurin hevur sín uppruna á tí, sum varð kallað Klaksvíkar Beat Festivali í 1972. Tá spældu teir í Atlantis Bio, og seinni spældu teir eisini til aðrar konsertir. Framførslurnar hjá Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags eru tiltiknar. Teir dugdu sum fáur at seta lív í áhoyrarafjøldina, og stundum var eisini okkurt púra óvæntað á skránni.

Men hvat skulu fólk so vænta frá bólkinum anno 2004.

- Vit eru kendir fyri at hava eitt gott show, og tað ætla vit okkum at liva upp til, sigur Ólavur Klakk, sum í hesum samanhangi gongur undir navninum Ólavur Presley.

Bólkurin hevur nógvar stuttligar sangir at taka - t. d. Mín Dingeling, Lambið sigur mæ, Ein nátt við tær og Fepur.

Alt hetta og annað gott verður at hoyra, tá bólkurin fer at spæla á Summar Festivalinum í Klaksvík.

### Gekkur spælir bass

Menninir, sum manna Ólavur Presley and his Dirty Rag Rags, eru kendir og royndir tónleikarar.

Ólavur Klakk er tann lívligi oddamaður, sum við sínum sangi og skráli hevur sett nýggjar normar fyri framførslu á føroyskum palli.

Afturat sær hevur hann Rudolf Joensen, sum tey flestu munnu kenna sum vertin í Gekkinum, Sonhard Johannesen, sum er royndur trummuspælari, Eliesar í Pálsstovu, sum er gittarspælari, Hanus G. Johansen, sum fólk helst kenna sum framúr vísusangara, og so yngsta mann í bólkinum, Johannes Poulsen, sum spælir klaver.

Bólkurin hevur longu vant fleiri ferðir, og teir ætla sær at vera væl fyri, tá teir fara á pallin í Klaksvík.

- Eg haldi, at vit eru við at blíva gamlir, tí nú venja vit langt áðrenn, vit skulu spæla, vit stemma ljóðførini, og vit spæla í sama duri, sigur Rudolf Joensen.

Og so er at vóna, at fólk verða heit - um ikki fáa fepur - tá Ólavur Presley og hansara menn fara at spæla lívligan rock ´n roll á Summar Festivalinum, sum verður hildin í døgunum frá 12. til 15. august.


## Broytingar á bussleiðini

### Leið 4
### 1. túr gerandisdagar úr Kollafirði

Í staðin fyri at koyra niðan eftir Dalavegnum út á Marknagilsvegin, fer bussurin, frá Steinatúni, at koyra út eftir J. Paturssonar gøtu, til Frælsið, Landssjúkrahúsið og út eftir Velbastaðvegnum, Marknagilsvegnum og út til Handilsskúlan/ skúlaheimið. Síðani koyrir bussurin heim eftir Marknagilsvegnum, eftir øllum ringvegnum og Yviri við Strond til Farstøðina.




· Fyrsti túrur um morgunin koyrir soleiðis: Norðuri í Sundum - Kollafjarðar skúli - Signabøur - Studentaskúlin - Rundkoyringin á Hálsi - Steinatún - Landssjúkrahúsið - Tekniski skúli - Handilsskúlin - Ringvegurin - Yviri við Strond - Farstøðin

### Skúlabarnakoyringin til Eysturskúlan

Eykabussurin til skúlabarnakoyringina byrjar við Marknagilsvegin ovast á Dalavegnum kl 7.25, fer niðan eftir Villingardalsvegnum, oman eftir Sundsvegnum til Berjabrekku og síðan í rutu sum vant.

**Marknagilsvegur-Eysturskúlin**

| | Marknagilsv. v.Dalav. | Villingardalsv. | Berjabrekka | millum Gilja | Løgmannabreyt | inni á Gøtu | Eysturskúlin |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mánadag-fríggjadag | 7.25 | 7.27 | 7.30 | 7.33 | 7.37 | 7.45 | 7.55 |

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
30 20 10 · www.torshavn.fo




**Miðflokkurin hevur júst lagt uppskot fram á ting um eykajáttan á 492.000 krónur til nógv umstrídda musikkskúlan. - Vit meta tað vera skeivt at skerja á øðrum økjum, og tí mæla vit til eykajáttan, sigur Jenis av Rana í tíðindaskrivi**



*Formaður Miðfloksins, Jenis av Rana, metir tað ikki vera rætt at flyta pening frá einari játtan til aðra, og tí hava hann og floksfelagar lagt uppskot fram um eykajáttan til Føroya Musikkskúla*

# Eykajáttan til musikkskúlan í tingið

EYKAJÁTTAN

*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Tað fór eitt ramaskríggj ígjøgnum landið, tá tað á sinni var greitt, at fimm lærarar og 200 næmingar ikki longur kundu vera virknir á musikkskúlanum orsakað av vantandi peningi. Undirskriftir vórðu savnaðar, sum avvarðandi foreldur handaðu løgmanni, og lesarabrøv í rúgvuvís hava verið at sæð í bløðunum frá fleiri síðum.

### Lønarvøkstur svíður

Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, ætlaði at loysa trupulleikan við at flyta 450.000 krónur frá játtanini til listaskúlan á Sandi og yvir til játtanina til musikkskúlan, men hetta noktaði Fíggjarnevndin.

Nú hevur formaður Miðfloksins, Jenis av Rana, lagt uppskot fram um eykajáttan til musikkskúlan við tí grundgeving, at tað ikki er rætt at skerja á øðrum økjum.

**FAKTA**

1500 næmingar eru á musikkskúlum kring landið

Bert í Havn eru 2500 fólk í bíðirøð

49 lærarar eru tengdir at musikkskúlunum

Harav eru 35 lærarar fulla tíð

Upprunaliga játtanin til musikkskúlarnar er 6.946.000 kr

Upphæddin, Miðflokkurin vil hava løgtingið at samtykkja til musikkskúlan, er 492.000 krónur, og sambært Jenisi er hetta peningurin, musikkskúlin skal hava fyri at varðveita sama støði sum í fjør.

Í skrivi frá Miðflokkinum verður greitt frá, at "eyka fíggjarliga byrðan, sum nýggju lønarsáttmálarnir høvdu við sær, ger, at musikkskúlarnir í verandi fíggjarári tørva kr. 492.000 fyri at kunna veita somu tænastu sum farna ár. Hetta fer, um ikki eykajáttan verður veitt, at hava við sær, at 200 næmingar missa frálæru teirra, nú skúlin byrjar aftur, og 5 lærarar verða sagdir úr starvi".

### Drúgvur bíðilisti

1500 næmingar fáa í dag frálæru á musikkskúlunum, og fleiri túsund eru í bíðirøð. Bert í Havn eru hesi 2500 í tali, og av hesum 2500 kundu tey 1200 byrja frálæru beinanvegin, um fíggjarligu møguleikarnir vóru til hetta.

Í skipanini eru í løtuni 49 lærarastørv, svarandi til 35 størv fulla tíð. Upprunaliga játtanin til musikkskúlar á núverandi bráðfeingisfíggjarlóg er slakar sjey milliónir, men henda upphædd verður nú møguliga hækkað eina hálva millión, um uppskotið hjá Miðflokkinum verður samtykt.

## Agnar Højgaard við nýggjari bók

Nú er nýggj bók komin á marknaðin. Heitið er "Føroyatraga, Rannsóknin og onnur útvald smáverk", og høvundurin er Agnar Jógvansson, og inniheldur hon bæði yrkingar og prosa. Hon er 70 blaðsíður til longdar og fæst í H.N. Jacobsens bókhandli og í bókasøluni í SMS, og kostar hon 50. Eisini fæst hon eftir umbøn við at venda sær til høvundan sjálvan á teldupostadressuni agnar_j@hotmail.com

## Andaligur mentunararvur á Margarinfabrikkini

Á ólavsøku verður serstøk framsýning í Margarinfabrikkini. Missiónsfelagsskapur í Føroyum stendur fyri tiltakinum at lýsa andalig virðir, sum vit eiga og hava havt upp ígjøgnum øldir í landi okkara. Nomið verður við ymisk øki s.s. familjuna, trúðbótina, tilfeingi og annað. Fyrireikarnir uppliva tað hugvekjandi og mennandi at hava arbeitt við hesum, og sum ein av teimum segði tað:

- Eg havið ikki bert fyngi uppfríska mína søguvitan, men lært nógv nýtt um mítt egna land, siðir okkara og tann týdning, trúgvin á Gud hevur havt upp ígjøgnum tíðirnar.

Endamálið hjá fyrireikarunum við framsýningini er at lýsa og minna á hetta grundarlag sum lagt er. Margarinfabrikkin, sum er karmur um framsýningina, er sera væl egna til hetta, tí har er bæði rúmsátt og ljóst inni.

Opið er flestu dagarnar frá 15:00 til 22:00. Lýsing stendur í

Ólavsøkuskránni. Fyrireikarar siga seg vóna og trúgva, at vitjandi koma at fáa eitt hugtakandi upplivisi. Høvi verður eisini til at keypað sær ein kaffimunn.


## »Choppari« til sølu



Ein av Føroya vakrastu motorsúkklum til sølu. Er upprunaliga ein Suzuki Intruder VS1400, men er sera nógv umbygd. Súkklan koyrir væl og er í sera góðum standi.

**Tlf. 229404**